# Tanntrygd
# tryggingarteytir

TRYGD

Nr. 33-01
Apríl 2021

www.trygd.fo

# INNIHALDSYVIRLIT


| | | |
|---|---|---|
| I | Felagstreytir fyri tryggingartakara | s. 3 |
| 1 | Tryggingartakari | s. 3 |
| 2 | Hvørji kunnu tryggjast? | s. 3 |
| 3 | Gildiskoma og høvuðsforfall | s. 3 |
| 4 | Tryggingargjald | s. 4 |
| 5 | Eftirstøða | s. 4 |
| 6 | Prístalsviðgerð | |
| 7 | Upplýsingarskylda | s. 4 |
| 8 | Tryggingartíðarskeið og uppsøgn | s. 4 |
| 9 | Broytingar | s. 5 |
| 10 | Lóggáva | s. 5 |
| 11 | Force Majeure | s. 5 |
| II | Felagstreytir fyri tryggjað/samtryggjað | s. 6 |
| 1 | Hvørji eru tryggjað/samtryggjað? | s. 6 |
| 2 | Hvar tekur tryggingin við? | s. 6 |
| 3 | Tryggingarupphædd | s. 6 |
| 4 | Skaðafráboðan og samtykki | s. 6 |
| 5 | Kærumøguleikar | s. 6 |
| 6 | Krav fellur burtur | s. 6 |
| 7 | Nær fellur tryggingin burtur? | s. 7 |
| 8 | Iðranarrættur | s. 7 |
| III | Tryggingartreytir fyri Tanntrygd | s. 8 |
| 1 | Hvussu verður endurgjaldið roknað? | s. 8 |
| 2 | Hvørjar viðgerðir fáast endurgjald fyri? | s. 8 |
| 3 | Hvørjar viðgerðir fáast ikki endurgjald fyri? | s. 8 |
| IV | Veitingarlistið | s. 10 |

# I. FELAGSTREYTIR FYRI TRYGGINGARTAKARA

## 1. Tryggingartakari

1.1 Tryggingartakari er tann fyritøka ella fakfelag, sum er nevnd/nevnt í tryggingarskjalinum (hereftir tryggingartakari).

1.2 Tað er tryggingartakarin, ið hevur rættindi at ráða yvir tryggingini. Hetta er somuleiðis galdandi í teimum førum, har tryggingin eisini fevnir um samtryggjað sambært grein 2.1 í I Felagstreytir fyri tryggingartakara.

## 2. Hvørji kunnu tryggjast?

2.1 Tanntrygd er stovnað sum ein bólkatrygging. Tryggjað eru tey starvsfólk yvir 18 ár, ið tryggingartakarin upplýsir fyri Trygd, skulu verða fevnd av bólkatryggingini.

### 2.2 Hjúnafelagar, skrásettir hjúnafelagar, sambúgvar og børn (18-24 ár)

2.2.1 Tryggingin kann eisini teknast fyri familjuna hjá tryggjaða t.v.s. hjúnafelagar, skrásettar hjúnafelagar og sambúgvar, umframt børn, ið eru millum 18 og 24 ár (hereftir samtryggjað).

2.2.2 Sambúgvi er í hesum førinum at skilja sum ein persónur, ið er í føstum parlagi við tryggjaða, og sum er tilmeldað/ur fólkayvirlitinum við føstum bústaði á sama bústaði sum tryggjaði.

2.2.3 Tað er somuleiðis ein treyt, at onnur samtryggjað hjá tryggjaða eru tilmeldað fólkayvirlitinum við føstum bústaði á sama bústaði sum tryggjaði, tó ikki børn millum 18 og 24 ár.

2.2.4 Børn verða allýst sum egin børn, fosturbørn (tað er eitt krav at talan er um kommunalt góðkenda foreldraskipan, eins og at talan skal vera um samdøgurrøkt á bústanum hjá húskinum) og stjúkbørn hjá tryggjaða.

2.2.5 Tað er ein treyt, at børn (sum allýst omanfyri), ið eru flutt heimanífrá, ikki liva í føstum parlagi ella hava fastbúgvandi børn hjá sær.

2.2.6 Hjúnafelagar, skrásettir hjúnafelagar og sambúgvar kunnu tryggjast frá tí degi, tey fylla 18 ár, og inntil tey fylla 65 ár. Hesi kunnu verða fevnd av Tanntrygd til ársenda tað árið, tey fylla 70 ár (sí tó grein 7 í II Felagstreytir fyri tryggjað/samtryggjað).

2.2.7 Børn hjá tryggjaða kunnu tryggjast frá tí degi tey fylla 18 ár, og inntil tey fylla 25 ár (og kunnu eisini vera fevnd av Tanntrygd í hesum tíðarskeiðnum).

## 3. Gildiskoma og høvuðsforfall

3.1 Tryggingartakarin ger av, nær tryggingin skal koma í gildi. Gildiskomudagurin sæst á tryggingarskjalinum. Høvuðsforfall er 1. januar á hvørjum ári, og tryggingargjaldið verður eisini javnað tá. Tryggingarárið er sostatt frá 1. januar til 31. desember.

### 3.2 Yvirlit yvir tryggjað

3.2.1 Áðrenn tryggingin kann koma í gildi, skal Trygd hava eitt yvirlit yvir tey, ið tryggingartakarin ynskir at tryggja (eitt kunnandi bræv við frágreiðing um, hvussu hetta verður gjørt, verður sent tryggingartakaranum, tá tryggingin kemur í gildi).

3.2.2 Bara tey, ið standa á yvirlitinum, sum tryggingartakarin letur Trygd, eru fevnd av Tanntrygd.

3.2.3 Tað er tryggingartakarin, sum til eina og hvørja tíð hevur ábyrgdina av, at Trygd hevur eitt dagført yvirlit yvir tey tryggjaðu.

### 3.3 Nýggj starvsfólk

3.3.1 Um tryggingartakarin ynskir at tryggja nýggj starvsfólk og møguligar hjúnafelagar/skrásettar hjúnafelagar/sambúgvar og børn (18-24 ár), skal tryggingartakarin dagføra yvirlitið yvir tryggjað og samtryggjað, ið skulu verða fevnd av tryggingini (sí frágreiðing í grein 3.1 í I Felagstreytir fyri tryggingartakara).

3.3.2 Inntekning er altíð tann 1. í einum mánaði.
Um tryggjaði verður settur í starv áðrenn tann 15. í einum mánaði, verður tryggingin teknað tann 1. í inniverandi mánaði.
Um tryggjaði verður settur í starv aftan á 15. í einum mánaði, verður tryggingin teknað tann 1. í fylgjandi mánaði.

### 3.4 Starvsfólk úr starvi

3.4.1 Um starvsfólk fer úr starvi, hevur tryggingartakarin skyldu til at dagføra og geva Trygd dagførda yvirlitið yvir tey, ið skulu verða fevnd av tryggingini.

3.4.2 Tryggjað, ið fara úr stavi, eru fevnd av tryggingini, inntil tryggingarárið er av (sí eisini grein 7 í II Felagstreytir fyri tryggjað/samtryggjað), og tryggingartakarin skal gjalda tryggingargjaldið fyri alt tryggingarárið.

3.4.3 Somuleiðis eru møgulig samtryggjað hjá tryggjaða, ið fer úr starvi, fevnd av tryggingini, inntil tryggingarárið er av, og tryggingargjaldið skal gjaldast alt tryggingarárið fyri hesi.

## 4. Tryggingargjald

4.1 Tryggingargjaldið verður ásett av Trygd fyri 1 ár í senn. Tryggingarárið er frá januar til desember, og høvuðsforfall er 1. januar. Tryggingargjaldið skal gjaldast frammanundan.

4.2 Við gildiskomu verður fyrsta gjaldið ásett eftir talinum av tryggjaðum/samtryggjaðum, ið tryggingartakarin hevur upplýst skulu verða fevnd av tryggingini.

4.3 Upplýsir tryggingartakarin, at nýggj tryggjað/ samtryggjað skulu verða fevnd av tryggingini eftir hetta, sendir Trygd uppkrav sambært dagførda yvirlitinum.

4.4 Um tryggingin kemur í gildi annað tíðarskeið enn við ársbyrjan, verður tryggingargjaldið roknað lutfalsliga í mun til teir mánaðir, tryggingin kemur at verða í gildi.

4.5 Við ársenda sendir Trygd tryggingartakaranum eina áminning um at dagføra yvirlitið yvir tey, ið skulu verða fevnd av Tanntrygd komandi tryggingarár.

4.6 Eftirfylgjandi tryggingarár byrjar 1. januar, og eftirfylgjandi tryggingargjøld verða ásett við støði í endaliga talinum av tryggjaðum/samtryggjaðum við ársenda í inniverðandi tryggingarári.

4.7 Tað er tryggingartakarin, sum hevur stovnað tryggingina hjá Trygd, ið skal gjalda tryggingargjaldið fyri starvsfólk/tryggjað, ið eru fevnd av bólkatryggingini.

4.8 Tað er tryggjaði/samtryggjað, ið skal gjalda tryggngargjaldið fyri samtryggjað, hóast fyritøkan/fakfelagið er tryggingartakari mótvegis Trygd.

## 5. Eftirstøða

5.1 Fyrsta tryggingargjaldið og uppkravsgjald fella til gjaldingar, samstundis sum tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingar-gjøld og uppkravsgjøld fella til gjaldingar, tá tryggingarárið byrjar 1. januar.

5.2 Verður tryggingargjaldið ikki goldið aftan á fyrsta krav, sendir Trygd nýggja skrivliga gjaldsáminning, og tryggingartakarin (ella tryggjaði, tá talan er um tryggingargjald fyri samtryggjað) verður skuldskrivað/ur fyri áminningargjald.

5.3 Í áminningarskrivinum verður tilskilað, hvør rættarfylgja stendst av, at tryggingargjaldið ikki verður goldið innan ta í skrivinum ásettu freist. Tílík áminning verður ikki send, fyrrenn 14 dagar eru farnir, síðani gjaldsfreistin sambært fyrsta uppkravi er farin.

5.4 Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, fellur ábyrgdin hjá Trygd burtur, og tryggingin er ikki í gildi í eftirstøðutíðarskeiðnum.

5.5 Rætturin til endurgjald kemur aftur í gildi frá tí degi, tryggingargjaldið verður goldið.

## 6. Prístalsviðgerð

6.1 Tryggingargjaldið verður javnað árliga við høvuðsforfalli sambært prísvøkstrinum í takstunum í tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Tannlæknafelagið/Tannrøktarafelagið og Heilsutrygd.

6.2 Ein møgulig prísbroyting fær virknað til høvuðsforfall á tryggingini. Er prosentvøksturin minni enn 2%, verður gjaldið tó javnað við 2%.

## 7. Upplýsingarskylda

7.1 Tryggingartakarin hevur skyldu til at upplýsa allar umstøður, ið Trygd metir vera neyðugar fyri at tekna tryggingina og fyri at meta um váða felagsins. Hetta er galdandi, tá ið tryggingin verður teknað, eins og tað er galdandi seinni.

7.2 Hevur tryggingartakarin ella tryggjaði, tá talan er um tryggingargjald fyri samtryggjað, goldið ov lítið í tryggingargjaldi orsakað av skeivum ella ófullfíggjaðum upplýsingum, hevur tryggingartakarin skyldu til at gjalda Trygd vantandi gjaldið, umframt møgulig ómaksgjøld.

7.3 Um so er, at Trygd ikki hevði teknað tryggingina, um Trygd hevði allar neyðugar og viðkomandi upplýsingar, er tryggingin at meta sum ongantíð at verða sett í gildi.

7.4 Hevur tryggingartakarin ella tryggjaði, tá talan er um tryggingargjald fyri samtryggjað, goldið ov nógv í tryggingargjaldi orsakað av skeivum ella ófullfíggjaðum upplýsingum, verður hetta ikki endurgoldið.

## 8. Tryggingartíðarskeið og uppsøgn

8.1 Tryggingin verður teknað fyri eitt tryggingarár í senn, um ikki annað er avtalað. Tryggingarárið er frá 1. januar til 31. desember.

8.2 Tryggingin kann sigast upp av báðum pørtum við eini freist á í minsta lagi 30 dagar til høvuðsforfall.

## 9. Broytingar

9.1 Um Trygd hækkar prísin ella broytir tryggingartreytirnar, verður hetta fráboðað minst 30 dagar áðrenn eitt høvuðsforfall.

9.2 Trygd kann somuleiðis herða tryggingartreytirnar og/ella hækka tryggingargjaldið, um eitt nú afturvendandi endurgjaldskrøv verða fráboðað. Um Trygd herðir tryggingartreytirnar og/ella hækkar tryggingargjaldið, hevur Trygd skyldu til skrivliga at boða tryggingartakaranum frá hesum við eini freist á 1 mánað til mánaðarlok.

9.3 Um tryggingartreytirnar verða herdar, kann tryggingartakarin siga tryggingina upp í seinasta lagi tann dagin, herdu treytirnar koma í gildi.

9.4 At tryggingin verður prístalsviðgjørd er ikki at rokna sum ein herðing av tryggingartreytunum.

## 10. Lóggáva

Umframt hesar tryggingartreytir er føroysk lóggáva á økinum og møguligar sertreytir á tryggingarskjalinum galdandi.

## 11. Force Majeure

11.1 Ábyrgdin hjá Trygd fellur burtur í førum, har force majeure forðar Trygd í at útinna sínar skyldur. Umstøður, sum eru fevndar av force majeure eru t.d. krígs- og yvirgangsgerðir, náttúruvanlukkur, farsóttir, ósemjur á arbeiðsmarknaðinum o.l.

11.2 Tað er bert í førum har Trygd als onga ávirkan hevur á viðkomandi hending/umstøðu, at vísast kann til force majeure. Talan skal vera um heilt serliga umstøðu/hending, sum hevur við sær, at tað er ógjørligt hjá Trygd at útinna sínar skyldur.

# II. FELAGSTREYTIR FYRI TRYGGJAÐ/SAMTRYGGJAÐ

## 1. Hvørji eru tryggjað/ samtryggjað?

1.1 Tryggjað eru tey starvsfólk, ið tryggingartakarin upplýsir fyri Trygd skulu verða fevnd av bólkatryggingini.

1.2 Samtryggjað eru møguligir hjúnafelagar, skrásettir hjúnafelagar og sambúgvar, umframt børn, ið eru millum 18 og 24 ár. Fyri nærri lýsing av tryggjaðu/samtryggjaðu, sí grein 2 í I Felagstreytir fyri tryggingartakaran.

## 2. Hvar tekur tryggingin við?

Endurgjald fæst fyri viðgerðir, sum verða gjørdar í Føroyum ella Danmark. Sí annars grein 2 í III Tryggingartreytir Tanntrygd.

## 3. Tryggingarupphædd

3.1 Árliga tryggingarupphæddin er kr. 30.000 fyri hvønn tryggjaðan. Upphæddin er føst og verður ikki prístalsviðgjørd.

3.2 Tryggingarárið er frá 1. januar til 31. desember. Um tryggingin kemur í gildi annað tíðarskeið enn við ársbyrjan, verður tryggingarupphæddin roknað lutfalsliga í mun til teir mánaðir, tryggingin hevur verið í gildi.

## 4. Skaðafráboðan og samtykki

4.1 Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald útgoldið, at tryggjaði/samtryggjaði fráboðar endurgjaldskravið til Trygd skjótast gjørligt aftan á viðgerð.

4.2 Tryggjaði/samtryggjaði skal gjalda rokningina og síðani fráboðað endurgjaldskravið umvegis heimasíðuna hjá Trygd: www.trygd.fo, har oyðublað til skaðafráboðan er at finna. Rokningin kann eisini innlesast heimasíðuni.

4.3 Fyri at Trygd skal kunna veita rætt og fullfíggjað endurgjald, er tað ein treyt, at tryggjaði/samtryggjaði skrivliga samtykkir (aftast á skaðafráboðanini), at Trygd kann innheinta upplýsingar frá arbeiðsgevara, læknum, sjúkrahúsum o.s.fr. eins og almennum myndugleikum, um hetta verður mett neyðugt fyri at avgreiða endurgjaldsspurningin.

4.4 Tað er ein treyt, at Trygd fær tær upplýsingar og tey skjøl, sum Trygd metir eru neyðug fyri at kunna viðgera endurgjaldsspurningin.

4.5 Finnast neyðugu skjalprógvini ikki, ella eru skjølini ikki lesandi, kann Trygd nokta fyri at veita endurgjald.

## 5. Kærunevnd

5.1 Er ósemja millum teg og Trygd um tryggingarviðurskifti, ella ert tú t.d. ónøgdur við avgerð, ið er tikin í sambandi við skaða, kanst tú, eftir at hava roynt semju við viðkomandi deild, venda tær til kæruviðgera okkara við at senda teldupost til **klaga@trygd.fo**. Sí fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo.**

5.2 Tú hevur eisini møguleika at kæra avgerðina til kærunevndina fyri trygging:

**Ankenævnet for Forsikring**
Østergade 18,2.
1100 København K
Tlf +45 33 15 89 00
Telefontíð kl. 10.00 – 13.00 (donsk tíð)
Heimasíða: **www.ankeforsikring.dk**

5.3 Kærunevndin kann tó bert viðgera kæruna, um:

1. Tryggjaði til fánýtis hevur roynt at fingið eina nøktandi avtalu við Trygd.
2. Trygd ikki innan 3 vikur hevur svarað eini skrivligari áheitan frá tryggjaða.
3. Tryggjaði rindar kærunevndini eitt gjald, sum kærunevndin hevur ásett.

5.4 Gjaldið verður goldið aftur, um tryggjaði fær fult ella lutvíst viðhald í kæruni, um kæran verður víst burtur, ella um tryggjaði sjálvur tekur kæruna aftur.

5.5 Vinarliga legg til merkis, at kæran skal skrivast á donskum.

## 6. Krav fellur burtur

6.1 Um tryggingin fer úr gildi, skal skrivlig fráboðan um krav um útgjald av endurgjaldi fyri ein skaða, sum er hendur ella staðfestur í tryggingartíðarskeiðnum, vera Trygd í hendi í seinasta lagi 6 mánaðir aftan á skaðan.

6.2 Í øðrum førum er tann til eina og hvørja tíð galdandi lóggáva um fyrning galdandi.

## 7. Nær fellur tryggingin burtur?

7.1 Tryggingin fellur burtur av sær sjálvum við næsta høvuðsforfall:

a) Um tryggjaði fer úr starvi hjá fyritøkuni, sum stendur sum tryggingartakari av Tanntrygd, ella ikki longur er limur í fakfelagnum, sum stendur sum tryggingartakari. Tryggingin hjá møguligum samtryggjaðum fer eisini úr gildi samstundis.
b) Tá tryggjaði er fyltur 70 ár. Tryggingin hjá møguligum samtryggjaðum fer eisini úr gildi samstundis.
c) Um tryggjaði og møguligur hjúnafelagi/skrásettur hjúnafelagi/sambúgvi verða sundurlisin ella fráskild, og/ella flyta hvør til sítt.
d) Um tryggjaði doyr, fellur tryggingin burtur av sær sjálvum deyðadagin.
e) Tá samtryggjað eru fylt 70 ár (børn tá tey eru fylt 25 ár).

7.2 Sambært grein 3.4.1 í I Felagstreytir fyri tryggingartakara hevur tryggingartakarin skyldu til at boða Trygd frá, um tryggjaði/samtryggjaði ikki longur skulu vera fevnd av tryggingini.

7.3 Tryggjaði hevur skyldu til at boða Trygd frá, um umstøðurnar omanfyri broytast í mun til møgulig samtryggjað í tryggingartíðarskeiðnum.

## 8. Iðranarrættur

8.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

8.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin er frá tí degi, at fráboðan um, at tryggingin er teknað, varð móttikin. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, at skrivlig upplýsing um iðranarrættin er móttikin.

8.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

8.4 Um tú ynskir at angra kepið av tryggingini, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

# III. TRYGGINGARTREYTIR TANNTRYGD

## 1. Hvussu verður endurgjaldið roknað?

1.1 Útreiðslur hjá tryggjaðum/samtryggjaðum til viðgerðir, ið eru fevndar, verða endurgoldnar sambært galdandi endurgjaldsupphæddum í veitingarlistanum (sí part IV) fyri Tanntrygd. Tó eru árligar avmarkingar galdandi sambært grein 2 í III Tryggingartreytir Tanntrygd (partur IV) og í veitingarlistanum.

1.2 Endurgjaldsprísirnir í veitingarlistanum fyri Tanntrygd eru grundaðir á, at tryggjaði/samtryggjaði fær endurgoldið upp til 80% av útreiðslunum til fevndu tannlæknaviðgerðirnar.

1.3 Um útreiðslurnar til viðgerð verða heilt ella lutvíst endurgoldnar av tí almenna, ella av eini aðrari trygging, sum t.d. arbeiðsskaðatrygging, vanlukkutrygging ella Heilsutrygd, veitir Trygd sín part t.v.s. upp til 80% av írestandi gjaldinum hjá tryggjaða/samtryggjaða fyri útreiðslur, sum geva rætt til endurgjald.

1.4 Fyri viðgerðir, ið ikki eru á veitingarlistanum, ger Trygd av, um og hvussu nógv endurgjald fæst.

1.5 Endurgjaldið fyri eitt tryggingarár kann ongantíð verða meira enn tryggingarupphæddin sambært grein 3 í II Felagstreytir fyri tryggjað/samtryggjað. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða samlaða upphæddin av útreiðslunum, sum tryggjaði/samtryggjaði hevur havt fyri viðgerðir, ið eru fevndar, í viðkomandi ári. Viðgerðirnar skulu vera staðfestar/skrásettar (diagnosticeret/journaliseret) av tannlæknanum hjá tryggjaða/samtryggjaða í hesum sama tryggingarárið.

1.6 Tað er umráðandi, at tannlæknin staðfesti/skrásetti (diagnosticeret/journaliseret) viðgerðartørvin í viðkomandi tryggingarári.

1.7 Krevur skaðin ella trupulleikin sambært tannlæknafakligari metan meira enn eina viðgerð, verður hetta at meta sum ein samlaður skaði, eisini um viðgerðirnar verða gjørdar yvir eitt tíðarskeið, ið er longri enn eitt tryggingarár.

## 2. Hvørjar viðgerðir fáast endurgjald fyri?

2.1 Endurgjald (við árligum avmarkingum í ávísum førum), fæst fyri lidnar tannviðgerðir sambært tí, sum stendur niðanfyri:

a) Fyllingar, í mesta lagi tríggjar árliga
b) Røntgen
c) Doyving
d) Rótviðgerðir, í mesta lagi tvær árliga (sí eisini árligu avmarkingarnar í veitingarlistanum í parti IV)
e) Tannhaldsviðgerðir, í mesta lagi kr. 2.000 árliga
f) Tanntøka og skurðviðgerðir
g) Protetik, í mesta lagi kr. 15.000 árliga (sí tó eisini grein 2.4, grein 2.5 og veitingarlistan í parti IV)
h) Bítiskinnara, ein hvørt 5. ár

2.2 Endurgjaldið fyri tannviðgerðirnar omanfyri, herundir eisini protetiskar viðgerðir (krónur, brúgvar og implantatir), verður gjørt upp sambært tilhoyrandi veitingarlista (partur IV).

2.3 Tað er ein treyt, at viðgerðin verður gjørd av løggildum tannlækna í Føroyum ella Danmark. Tó kunnu tær viðgerðir, sum eru merktar * í veitingarlistanum (partur IV), eisini gerast hjá løggildum tannrøktara í Føroyum ella Danmark.

**2.4 Protetik**

Fyri protetiskar viðgerðir, so sum krónur/brúgvalið/implantat, fæst í mesta lagi endurgjald fyri eina av hesum viðgerðum árliga, og innan hámarks endurgjaldið sambært árligu tryggingarupphæddini.

**2.5 Endurgerð av protetik**

2.5.1 Haldgóðskan fyri proteiskar viðgerð (krónu/brúgvalið, tó ikki implantat) heilt ella lutvíst fevnd av Trygd, skal vera minst 5 ár fyri at geva rætt til endurgjald í sambandi við endurviðgerð.

2.5.2 Trygd veitur ikki endurgjald fyri endurgerð av implantatum.

2.5.3 Endurgjald fyri endurgerð av protetiskum viðgerðum, sum Trygd hevur veitt endurgjald fyri áður, verður ikki veitt, um orsøkin til endurgerðina er, at viðgerðin ikki var nóg væl gjørd upprunaliga.

## 3. Hvørjar viðgerðir fáast endurgjald ikki fyri?

**3.1 Kanning og tannreinsan**
Trygd veitur ikki endurgjald fyri kanning og tannreinsan.

**3.2 Fríðkandi (kosmetiskar) viðgerðir**
Trygd veitur ikki endurgjald fyri fríðkandi (kosmetisk) viðgerð. Hetta er viðgerð, har høvuðsendamálið er at bøta um útsjóndina av tonnunum hjá tryggjaða/samtryggjaða, uttan at talan er um viðgerð av veruligari sjúku í tonnunum. Fríðkandi viðgerðir eru:

a) Tannbleiking
b) Onnur viðgerð av mislittum tonnum
c) Tannrætting
d) Plast- og porcelænsklædningar
e) Onnur sløg av viðgerðum, sum kunnu javnsetast við viðgerðir omanfyri.

**3.3 Hækkan av bitinum**

Tryggingin fevnir ikki um endurgjald fyri hækkan av bitinum, um hendan er neyðug orsakað av eyðsýndum sliti/etsan, sum longu var, tá tryggingin bleiv teknað.

**3.4 Viðgerðir, ið longu vórðu byrjaðar, ætlaðar ella tilráddar**

Tryggingin fevnir ikki um endurgjald fyri viðgerðir, ið longu vórðu byrjaðar, ætlaðar ella tilráddar, ella viðurskifti, sum vóru staðfest (diagnosticeret), áðrenn tryggjaði/samtryggjaði bleiv fevnd/ur av Tanntrygd.
Um ikki nøktandi journal-/røntgenskjalprógv fyriliggur aftur í tíð (minst 3 ár), í sambandi við protetiskar skaðar (krónur/brúgvalið/implantat), fær Trygd uttanveltaðan tannlækna at gera eina tannlæknafakliga meting, um ein skaði í veruleikanum longu var til staðar, tá ið tryggingin bleiv teknað.

**3.5 Ovurviðgerð**

Trygd veitur ikki endurgjald fyri ovurviðgerð. Ovurviðgerð er at skilja sum viðgerð har:
a) Eingin heilsuorsøk er fyri viðgerð, mett við útgangsstøði í fyriliggjandi røntgen- og journaltilfari.
b) Viðgerðin ikki er nóg væl grundað, mett við støði í vanliga viðurkendum tannlæknafakligum støði.

**3.6 Manglandi tenn**

Trygd veitur ikki endurgjald fyri manglandi tenn. Tað vil siga tenn, ið ikki vóru í tanngarðinum hjá tryggjaða/samtryggjaða (harundir eisini øki við implantatum), tá tryggingin varð teknað.

**3.7 Krónuviðgerð á kliniskt frískum tonnum**

Trygd veitur ikki endurgjald fyri krónuviðgerð á kliniskt frískum tonnum, sum eru partar av brúgv í eini brúgvakonstruktión, um ikki onnur heilsuorsøk fyri viðgerð er til staðar.

**3.8 Fylgiskaðar av prýðislutum og líknandi**

Trygd veitur ikki endurgjald fyri skaðar á tanngarðin, sum skyldast, at tryggjaði/samtryggjaði hevði/hevur prýðislutir límaðar á tenninar, ringar (piercingar) í ella rundan um munnin, eins og aðrir prýðislutir, ið kunnu javnsetast við hesar.

**3.9 Ábyrgdararbeiði (garantiar bejde) og feilviðgerð**

Trygd veitur ikki endurgjald fyri viðgerð, sum eftir avtalu millum tannlæknan og tryggjaða/samtryggjaða kemur undir garanti. Heldur ikki veitur Trygd endurgjald fyri feilviðgerð, sum tannlæknin er bundin til at endurgjalda ella at gera umaftur.

**3.10 Tá ið tryggjaði/samtryggjað sjálv/ur er atvoldin, grovt óskettin e.l.**

Skaðar á tenninar hjá tryggjaða/samtryggjaða, sum skyldast, at tryggjaði/samtryggjaði:
a) Sjálv/ur hevur verið atvoldin til skaðan, ella hevur gjørt skaðan við vilja.
b) Hevur verið grovt óskettin.
c) Hevur verið ávirkaður av rúsdrekka, rúseitri, heilivági ella øðrum rúsevni og/ella eiturevni.
d) Hevur verið í bardaga.

# IV VEITINGARLISTI TANNTRYGD 2021

| Kotur | Veitingar | Endurgjald | Avmarkingar |
|---|---|---|---|
| | **1. Diagnostikkur o.a.** | | |
| 1201 | Røntgenmynd* | Kr. 68 | |
| 1202 | Ortopanmynd | Kr. 440 | |
| 0 | Doyving* | Kr. 210 | |
| 2920 | Fyribyrgjandi einstaklingaviðgerð | Kr. 118 | |
| 3010 | Hygiejneískoyti | Kr. 24 | |
| | **2. Tannfyllingar** | | |
| 1501 | Einkult, amalgam | Kr. 174 | Fyllingar í mesta lagi 3 stk. pr. ár. |
| 1502 | Sambundin, amalgam | Kr. 222 | |
| 1503 | Tvísambundin, amalgam | Kr. 292 | |
| 1504 | Emaljusementfylling | Kr. 141 | |
| 1505 | Plastfylling, ein flati* | Kr. 278 | |
| 1506 | Plastfylling, fleiri flatar* | Kr. 311 | |
| 1507 | Glasionomerfylling* | Kr. 278 | |
| 1511 | Einkult, plast (stor occ. i præmolar) | Kr. 323 | |
| 1512 | Sambundin, plast (præmolar) | Kr. 861 | |
| 1513 | Tvísambundin, plast (præmolar) | Kr. 714 | |
| 1521 | Einkult, plast (stor occ. i molar) | Kr. 393 | |
| 1522 | Sambundin, plast (molar) | Kr. 794 | |
| 1523 | Tvísambundin, plast (molar) | Kr. 895 | |
| | **3. Rótviðgerð/pulpaviðgerð** | | |
| 1600 | Pulpaskurður | Kr. 154 | Takstískoyti 80% av kostnaðinum tryggjaði skal gjalda, tó í mesta lagi kr. 600 pr. viðgerð/tonn. |
| 1601 | Krúnupulpatøka | Kr. 177 | |
| 1602 | Rótpulpatøka og rótfylling í eina kanal | Kr. 278 | |
| 1603 | Rótfylling í hvørja fylgjandi kanal | Kr. 75 | |
| 1604 | Rótskol | Kr. 101 | |
| 1610 | Takstískoyti til rótviðgerð | | Rótviðgerð/pulpaviðgerð í mesta lagi 2 stk. pr. ár. |
| 1620 | Bráfeingins opnan til pulpa | Kr. 174 | |
| | **4. Tannhaldsviðgerð/parodontoseviðgerð o.a.** | | |
| 1420 | Vanlig tannhaldsviðgerð* | Kr. 383 | Tannhaldsviðgerð/parodontoseviðgerð í mesta lagi kr. 2.000 fyri hvørt ár. |
| 1431 | Rótreinsan (fyri hvørja tonn yvir 5 mm poche)* | Kr. 78 | |
| 1430 | Víðkað tannhaldsviðgerð* | Kr. 614 | |
| | **5. Tanntøkur og skurviðgerðir** | | |
| 1801 | Tanntøka og skurðviðgerð | Kr. 1.000 | |
| | **6. Protetik (krúnur/brúgvar/implantatir)** | | |
| | Protetikviðgerðir (krúnur/brúgvalið/implantatir) | | 80% av kostnaðinum tryggjaði skal gjalda, (t.v.s. aftan á ískoytið frá Heilsutrygd), tó í mesta lagi kr. 15.000 um árið. |
| | **7. Bítiskinnarar** | | |
| | Bleytan bítiskinnara | Kr. 1.976 | Í mesta lagi ein hvørt 5. ár. |
| | Harðan bítiskinnara | Kr. 2.316 | |

Upphæddirnar í veitingarlistanum kunnu verða upp til 80% av tí partinum tryggjaði/samtryggjaði skal gjalda sambært takstunum í galdandi sáttmála millum Heilsutrygd og ávíkavist Tannlæknafelagið og Tannrøktarafelagið (dagfestir 1. oktober 2020). Tó eru upphæddirnar fyri doyving pkt. 1, takstískoyti til rótviðgerð pkt. 3 og upphæddirnar undir pkt. 5-7, ikki sambært sáttmála. Eftirfylgjandi eru tað upphæddirnar í tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Heilsutrygd og ávíkavist Tannlæknafelagið og Tannrøkt-arafelagið, ið verða nýttar sum útgangsstøði til endurgjaldsupphæddirnar. Samlaða árliga endurgjaldið kann ongantíð verða hægri enn kr. 30.000.
Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

*Hesar viðgerðir kunnu eisini gerast hjá løggildum tannrøktara í Føroyum ella Danmark.

P/F Trygd
Tryggingarfelag

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg